DAGSINS MEINING

Hótta okkara egnu jør›

Í hesum døgum er stór rá›stevna í Hálandi, har "Global Warming", te. yvirupphiting av jør›ini vegna dálking er evni›. Rá›stevnan byggir á a›rar rá›stevnur í Japan og Brasil. Hóast vísindafólk hava gjørt vart vi›, at jør›in ver›ur yvirupphita› orsaka› av vakstrarhúseffektini, sum Co2 og onnur dálkandi evni frá orkuframlei›slu eru atvoldin til, so tykist ikki sum um at heimsins lond taka hetta í nóg stórum álvara. Vísindafólkini vísa á vandan vi›, at eiturevni frá eitt nú milliardum av bilum fara út í luftina og eru orsøk til eina prosess, sum hevur vi› sær, at jør›in ikki sleppur av vi› hitan. Jør›in ver›ur yvirupphita›. Higartil hevur ta› eydnast stjórnum, oljufeløgum o. ø. sum sita á valdinum í ríka heiminum, at for›a fyri, at nóg stór krøv til minking av dálking ver›a gingin á møti.

Ta› eru so eisini teir vísindamenn, sum hava ført fram, at orsøkirnar til yvirupphitingina eru náttúrligar. Hetta er so ta›, sum oljufeløgini hava brúkt í sínum lobbyarbei›i møtvegis politikarunum. Og ta› er ein orsøk til, at frágrei›ingarnar um hóttanina frá dálkingini ikki eru tiknar í álvara. Men nú er vónandi ljós fyri framman, um ein kann siga ta› so. Nú tykjast flestu vísindafólk sannførd um, at naka› er um tosi›. Kanningar vísa, at jør›in ver›ur upphita› nógv skjótari enn hildi›. Og tí ver›ur ta› nú aftur rópt varskó. Ta› eru ikki minst tey ríku londini, sum vi› sínum stóra forbrúki eitt nú av akførum, sum eru mest sek í umrøddu dálking. Higartil hevur eitt land sum USA, sum er ta› landi› í heiminum, sum dálkar mest, tí n‡tslan av eitt nú bensini og olju er so stór, ikki vilja› tiki› ávaringarnar fyri fult. Roynt hevur veri› at skáka sær undan hesi ábyrgd vi› at vísa til nettupp teir vísindamenn, sum hava undirmett vandan.

Vi› rá›stevnuni í Amsterdam fara heimsins lond uttan iva at taka henda dálkingarvanda í nógv størri álvara. Vísindafólk eru farin at tosa um framtí›ina hjá okkara børnum, sum er álvarsliga hótt. Vandi er fyri at nógv lond í fátæka heiminum fara at gerast enn fátækari, tí stóri hitin fer at gera av vi› grø›ina. Vandi er fyri, at lond, sum liggja vi› sjóvarmálan, koma at standa undir í sjógvi, tá ísurin á pólunum brá›nar. Og solei›is kann ver›a hildi› fram - sum var talan um ein ræ›ufilm frá eini ókendari framtí›. Veruleikin tykist nú vera tann, at hetta er naka›, sum vit og í hvussu er okkara børn fara at uppliva. Okkurt má gerast nú.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

N‡ggjur skrivari í Útnor›urrá›num

35 ára gamli havnarma›urin Ernst Sumberg Olsen er settur í starv sum skrivari í Útnor›urrá›num, har Føroyar, Grønland og Ísland eru limir.

Hetta merkir, at Ernst skal flyta til Ísland, har høvu›sskrivstovan er løgd. Uppgávan hjá skrivaranum í Útnor›urrá›num er fyrst og fremst at samskipa ta›, sum fer fram í rá›num.

Ernst Sumberg Olsen tók HH-prógv í 1988 í Tórshavn, BA í 1991 á University of East Anglia (Norwich), EE í 1996 (Den Danske Eksportskole), MA í bókmentafrø›i 1999 frá Aberdeen University. Á›renn hann fór undir skúlagongd arbeiddi hann á flakavirki, sum lastbilførari og sigldi vi› trolara.

Ernst var lei›ari á Kemilux Limited í eitt ár frá 1996-1997. Summari› 1998 var hann hjá Amerada Hess í Aberdeen á deildini fyri Corporate Affairs og PR.

Ernst hevur arbeitt á Løgtingsskrivstovuni sí›an á vári 1999, men hesum gevst hann nú vi›. Hansara arbei›søki á Løgtingsskrivstovuni hevur veri› at røkja skrivara- og rá›gevarauppgávur, i› vi›víkja Nor›urlandará›num og Útnor›urrá›num. Annars hevur hann tiki› sær av ø›rum altjó›a uppgávum og luttiki› í vanligari málsvi›ger› á skrivstovuni.

Enn er ikki heilt greitt nær Ernst Sumberg Olsen skal byrja í n‡ggja starvi sínum.

Jancy skal lei›a sosialu deild

Jancy Biskopstø Klein ver›ur lei›ari á n‡ggju sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu.

35 ára gamla Jancy er úr Klaksvík, men hevur veri› búsitandi í Danmark seinastu 10 árini.

Hon tók útbúgving sum sosialrá›gevi á Den Sociale Højskole í Odense í 1993. Sí›ani tá hevur hon starvast ymsasta›ni á Fjóni. Fyrstu árini arbeiddi hon hjá Fyns Amt, og fekst vi› ta›, tey rópa distriktspsykiatri. Hon hevur eisini arbeitt vi› aktivering av ungfólki, og seinastu fimm árini hevur hon fingist vi› flóttarfólk, sum koma til Danmarkar.

Hetta starvi› hevur veri› hjá Odense kommune, og uppgávan hjá Jancy hevur veri› at tiki› sær av flóttarfólkum, sum eru send frá Dansk Flygtningehjælp og til eina serliga deild á Fjóni. Seinastu tvey árini hevur Jancy tiki› ímóti flóttarfólki, sum eru komin beinlei›is úr ymsum kreppuøkjum kring heimin.

Eftir útbúgving og starvsroyndir í Danmark seinastu 10 árini, er Jancy nú sett sum lei›ari av n‡ggju sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu. Afturat sær hevur hon fimm starvsfólk.

Jancy er gift og eigur tvey børn.

Treytir fyri valgreinar

Nú tí›in styttist til b‡- og bygdarrá›svali› 21. november, eru vit her á bla›num vi› at ganga undir í valgreinum. Hóast vit seinastu dagarnar hava prenta› fleiri sí›ur vi› valtilfari, liggja framvegis hópin av greinum eftir.

Øll valevni eru kortini vælkomin at senda okkum tilfar, men vit kunnu kortini ikki lova, at tilfari› kemur í bla›i›, tá valevni ynskja ta›.

Fyri at bøta um henda trupulleika hevur bla›lei›slan gjørt av, at valtilfari› ikki skal fylla meira enn eina A4 sí›u - ella umlei› 2.500 tekn.

Saman vi› valgreinum kann prentast andlitsmynd av valevninum. Annar grafikkur ver›ur ikki tikin vi›.

Roknast kann ikki vi› at fáa valtilfar í leygardagsbla›i›.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Klaksvík fingi› n‡ggja sosiala deild

N‡ggja sosiala deild hjá Klaksvíkar kommunu er nú farin at virka. Seks fólk starvast á deildini, sum heldur til í b‡rá›shúsinum

SOSIAL DEILD
Ey›un Klakstein

Seks fólk skulu starvast á n‡ggju sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu. Mynd: TS

Klaksvík: Átta ár eftir at øll starvsfólkini á sosialu deild vóru send til hús, hevur Klaksvíkar kommuna nú skipa› sosialu deild av n‡ggjum.

– Hev›i eg havt ta vitan, sum eg havi í dag, hev›i eg neyvan veri› vi› til at stong sosialu deild í 1993, seg›i forma›ur í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar b‡rá›i, Jógvan Lutzen, tá móttøka var í n‡ggju skrivstovuhølunum mánadagin.

Tá var mitt í kreppuárunum, at Klaksvíkar kommunu var› noytt at minka um umsitingina, tí inntøkurnar minka›u so nógv. Og millum fólkini, sum vóru koyrd, vóru fólk á mentanardeildini og sosialu deild.

– Samfelagi› broytist alsamt, og nú landsmyndugleikarnir lata kommunurnar yvirtaka fleiri øki, mugu vit gera okkum út til at taka ímóti hesum, seg›i Jógvan vi› Keldu, borgarstjórin í Klaksvík, tá almenna móttøkan hjá sosialu deild var fyrradagin.

Øvugt at lata aftur

Forma›urin í sosialu deild, sum saman vi› borgarstjóranum helt røu á móttøkuni, vísti á, ta› var óheppi› at steingja sosialu deild í 1993.

– Eg eri grei›ur yvir, at b‡rá›i› var› noytt at minka um umsitingina, men ta› kann tykist eitt sindur øvugt at lata sosialu deild aftur, júst tá ney›in leika›i har›ast á, seg›i Jógvan Lutzen.

- Eg eri grei›ur yvir, at b_rá›i› var› noytt at minka um umsitingina, men ta› kann tykist eitt sindur øvugt at lata sosialu deild aftur, júst tá ney›in leika›i har›ast á, seg›i Jógvan Lutzen, forma›ur í sosialu deild.
Mynd: TS

– Samfelagi› krevur, at vit hava eina gó›a sosiala deild, men landsmyndugleikarnir skulu gera sær greitt, at saman vi› uppgávunum, sum teir leggja á kommunurnar, skulu pengar eisini fylgja vi›, seg›i hann.

Hetta sjónarmi›i› hev›i Jógvan vi› Keldu eisini á lofti undir sínari røu.

– Landi› leggur uppgávu yvir á kommunurnar, uttan at pengar fylgja vi›, og ta› er ikki rætt. Pengar mugu fylgja vi›, seg›i borgarstjórin í Klaksvík.

Tæna teimum veikaru

Seks fólk starvast á n‡ggju sosialu deildini hjá Klaksvíkar kommunu, sum skal halda til í ovastu hædd í b‡rá›shúsunum.



- Samfelagi› broytist alsamt, og nú landsmyndugleikarnir lata kommunurnar yvirtaka fleiri øki, mugu vit gera okkum út til at taka ímóti hesum, seg›i Jógvan vi› Keldu um n‡ggju sosialu deild.
Mynd: TS

Jancy Biskopstø Klein er lei›ari av deildini, sum skal umsita barnaansing, fólkayvirlit og onnur mál á sosiala økinum.

– Tit mugu altí› minnast til, at tá fólk, sum hava hjálp fyri ney›ini, koma til tykkara, so eru tit tey sterkaru. Tí er ta› t‡dningarmiki›, at tit altí› kenna tykkum sum ein tænara hjá teimum, sum kenna seg veikari, seg›i Jógvan vi› Keldu vi› starvsfólkini.

Jógvan Lutzen, forma›ur í sosialu deild, handa›i vegna b‡rá›i› sosialu deild eina gávu, sum var ein málningur hjá lokala listarmanninum Edvardi Fugløy.

Jazzkonsert í Nor›urlandahúsinum

Swing-violin a la Stephan Grapelli

I kvøld (mikudag) kl. 19.30 skipar Føroya Jazztónleikarafelag fyri einari konsert, har tónleikarar, sum vit annars kenna frá klassiska umhvørvinum spæla swing-jazz.

Nicos Kapnas violin, Stamen Stantchev piano, Bo Isholm guitar og Edvard N. Debess kontrabas spæla eina skrá vi› Gerswin, Porter og Ellington. Gó›ur og kendur jazztónleikur, sum til dømis lagi› lagi› Tea for Two og Lady be Good – bæ›i rættir jazzklassikarar.

Í kvøld skulu eisini trígg-ir ungir saxofonistar spæla hvør sítt sololag. Ása Johannesen spælir lagi› Autumn Leaves, Teitur H. Olsen spælir Tenor Madnes og Ida Berner Holm lagi› Nature Boy. Ta› ver›ur spennandi at hoyra hesar ungdómarnar spæla saman vi› okkara professionellu tónleikarum. Magnus D. Madsen, eisini ungur tónleikari, spælir trummur til hesi løgini.

Nógvur roykur

Mánakvøldi› kom eldur í nøkur vatnfiltur á eini goymslu hjá East Salmon í Klaksvík

ELDUR
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Um átta tí›ina mánakvøldi› var sløkkili›i› í Klaksvík bo›sent til gamla Dávavirki›, sum stendur á bryggjuni á vestara armi.

Eldur var komin í á ni›aru hædd í bygninginum, sum East Salmon brúkar sum goymslu.

Orsøkin var, at ein ma›ur hev›i skori› nøkur rør av í ovaru hæddini, og gló›ir høvdu fest í fleiri vatnfiltur í ni›aru hæddini.

Filtrini brendu framvegis, tá sløkkili›i› kom á sta›i›, men eldur var skjótt sløktur. Nógvur roykur stó› úr bygninginum, bæ›i me›an ta› brendi, og eftir at ta› var sløkt, men ska›in var lítil og eingin.

Naka› av laksi stó› inni í bygninginum, men hann var væl innpakka›ur og var› fingin út beinanvegin.